# Vegleiðing til fótbóltsvenjingar og fótbóltsdystir – dagførd 03.11.2021

Henda koronavegleiðing og tilmæli er galdandi fyri skipan av venjing og dystum.

## Leiðreglur í sambandi við venjing:

- Um man er sjúkur, er man heima og møtir ikki til venjing. Um man ivast, er man eisini heima.
- Sjúkutekin: Fepur, ilt í hálsinum, hosti, trongd, manglandi lukti- og smakkisansur o.l.
- Skiftingarrúm og styrkirúm eru stongd – leikarar skifta heima áðrenn og aftaná venjing.
- Er felagsfundur áðrenn ella aftaná venjing, eiga bólkar á max. 10 persónar at sita saman við í minsta lagi 2 metrar frástøðu millum hvønn leikara. Mælt verður til at skipa videofundir um gjørligt.
- Leikari hevur sín egna drekkidunk við til venjing.
- Allur leikarahópurin kann møta til venjing.
- Bólturin kann verða ein smittukelda, og skal vaskast áðrenn og aftaná venjing.
- Vestar og venjingarútgerð skal í mestan mun handfarast av sama persóni, og útgerðin skal vaskast áðrenn og eftir venjing.
- Allir leikarar og venjarar/hjálparfólk skulu vaska/spritta hendur áðrenn og aftaná venjing.
- Felagið skrásetur allar persónar, sum eru til staðar til hvørja venjing (navn, telefonnummar, teldupostadressu)

## Leiðreglur í sambandi við dystir:

- Um man er sjúkur er man heima og møtir ikki til dyst. Um man ivast, er man eisini heima.
- Sjúkutekin: Fepur, ilt í hálsinum, hosti, trongd, manglandi lukti- og smakkisansur o.l.
- Skiftingarrúm eru tøk – har møguligt, eru í mesta lagi 10 leikarar í hvørjum skiftingarrúmi, teir somu leikararnir áðrenn og eftir dyst. Í hálvleikinum er loyvt at hava allan hópin í sama rúmi.
- Um skiftingarrúm verður nýtt til fleiri ymisk lið sama dag, skal rúmið vaskast/sprittast í millum dystirnar.
- Er felagsfundur áðrenn dyst, er loyvt at samla allan hópin í stórum høli, í minsta lagi 2 metrar ímillum hvønn leikara.
- Leikari hevur sín egna drekkidunk við til dyst.
- Bólturin kann verða ein smittukelda, og skal vaskast áðrenn og aftaná dyst
- Vestar og venjingarútgerð skal í mestan mun handfarast av sama persóni, og útgerðin skal vaskast áðrenn og eftir dyst.
- Leikarar heilsast ikki við lógvataki áðrenn og aftaná dyst
- Allir leikarar, venjarar/hjálparfólk, dómarar og bóltdreingir/gentur skulu vaska/spritta hendur áðrenn og aftaná dyst
- Heimafelag hevur ábyrgd av at nóg mikið av spritti er í skiftingarrúmunum
- Allar fjølmiðlasamrøður við leikarar skulu gerast uttandura
- Heimafelag hevur ábyrgd av at skráseta allar persónar, sum eru til staðar til hvønn dyst (navn og telefonnummar).

## Leiðreglur í sambandi við áskoðarar:

- Dystir skulu spælast uttan áskoðarar
- Heimafelag skal tryggjað, at eingin áskoðari er á ítróttarøkinum, ið er økið, sum vanliga verður kravt atgongumerki til.
- Tey fólk, sum hava atgongd til dystir, eru:
  - Í mesta lagi 18 leikarar x 2
  - 8-10 venjarar og leiðarar x 2
  - 4 dómarar og 1 eygleiðari
  - umleið 15-20 hjálparfólk
  - Í mesta lagi 6 bóltdreingir/gentur
  - Fólk, sum hava arbeiðisuppgávur (landsliðsvenjarar, fjølmiðlar v.m.)

**Fótbóltssamband Føroya**